## Amager vann seinasta dystin

Um vikuskiftið var seinasta umfar í donsku 2. deild. Fremad Amager spældi ímóti Stenløse, og Amager vann dystin 2-1. Morten Juul Hansen og Anders Jochumsen skoraðu málini. Einasti føroyski spælarin á vøllinum hendan dystin var Rókur av Fløtum Jespersen. Hann kom á vøllin, tá ið tað restaðu góðir 10 minuttir av dystinum.



## Spæla ímóti Braband

Fremad Amager endaði næstfremst í 2. Deild Eystur, og teir skulu nú spæla uppflytingardystir ímóti næstfremsta liðnum í 2. Deild Vestur. Tað gjørdist Brabrand. Fyrri dysturin millum Brabrand og Fremad Amager verður í Branband mikukvøldið kl. 18.00. Seinni dysturin verður á heimavøllinum hjá Fremad Amager sunnudagin 22. Juli kl. 14.00. Liðið, sum vinnur dystirnar samanlagt, flytir upp í næstbestu deildina.

# Tvey ára sigursrøð brotin

**Kvinnurnar á Gongurólvi vunnu fyri fyrstu ferð síðani á Varmakeldu í 2003, og Jarnbardur vann ikki fyri fyrstu ferð síðani á Eystanstevnu í 2006**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Á norðoyastevnu vistu tær á Gongurólvi ikki, hvørjari støðd tær skuldu rógva í, men tann ivin var burturi í Hósvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var stórur fagnaður umborð á Gongurólvi, tá ið 6-mannaførini við kvinnum fóru um málið á Sundalagsstevnu í Hósvík. Og tað var ikki so undarligt. Seinnu árini hevur tað ikki verið á hvørjum degi ella ári, at annar vinnari hevur verið enn Jarnbardur, og í uppaftur størri mun hevur tað tey seinnu árini ikki verið á hvørjum ári, at Gongurólvur við kvinnumanning er farin fyrstur um málstrikuna.

Síðani á Eystanstevnu í 2006 hevur Jarnbardur vunnið allar róðrarnar, og tað skal leitast aftur til á Varmakeldu í 2003 fyri at finna róður, tá ið Gongurólvur við kvinnum vann. Ta ferðina var Jarnbardur næstur á mál.

Jarnbardur vann á Norðoyastevnu, men tað sást skjótt, at í Hósvík ætlaðu tær umborð á Gongurólvi sær meiri enn næstfyrsta plássið, sum tær vunnu á Norðoyastevnu, tá ið bara vóru tveir luttakarar.

Gongurólvur hevði besta startin. Jarnbardur royndi at svara aftur bæði eina ferð og tvær ferðir, men tað eydnaðist ikki, og á málinum var munurin meiri enn ein bátslongd.

Hósvíkingur fylgdi báðum gestunum inn á málið. Lómur var eisini á listanum, men kvinnurnar av Argjum vórðu kolldømdar og róðu tískil ikki. Tær sóu tvær ferðir gult. Fyrru ferðina fyri at hanga eftir í startinum og seinnu ferð fyri at sleppa teyminum, áðrenn startskotið varð latið av.

## Sílið fekk aftur gull

**Hóast kappingin hesa ferð var størri, enn hon var í Klaksvík, so megnaðu kvinnurnar á Sílinum at endurvinna kappingina við Frúnna**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á norðoyastevnu var munurin trý sekund, sum svarar til eina bátslongd. Kvinnurnar á Sílinum vunnu á Frúnni, og á sundalagsstevnuni í Hósvík megnaðu kvinnurnar á Sílinum at endurvinna sigurin, og munurin var umleið tann sami, sum hann var í Klaksvík.

Kappingin var eina løtu rættiliga tøtt millum Sílið og Frúnna. Eitt sindur undan endaspurtinum var um reppið, at Frúgvin tók Sílið aftur, men so svaraði Sílið aftur, og í endaspurtinum vóru kvinnurnar hjá Havnar Róðrarfelag sannførandi.

Nú er Sílið greiður favorittur at vinna FM, men tað vil ikki siga tað sama sum, at møguleikin hjá Frúnni er burtur at vinna onkran róðurin og harvið at fáa spenning í aftur.

Í fjør var Sílið FM vinnari. Tá vunnu Síla kvinnurnar fýra róðrar. Fyrstu ferð tær vórðu tiknar var longu í næsta FM róðrinum. Soleiðis gekk tað ikki hesa ferð. Sílið hevur vunnið tvær tær fyrstu kappingarnar, og so er spurningurin, hvussu tað verður á Jóansøku.

## Meistararnir svaraðu aftur

**Hvassi við gentumanning var fyrstur um málstrikuna eftir ógvuliga tættan endaspurt við Drekan**

KAPPRÓÐUR
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ógvuliga tætt og spennandi í endaspurtinum í fyrsta FM róðrinum á sundalagsstevnu, sum var róðurin millum 5-mannafør við gentum.

Drekin, sum vann á Norðoyastevnu, og Hvassi, sum er báturin hjá Sunda Róðrarfelag, vóru í sera tættari kapping í endaspurtinum. Teir róðu fram ímóti málinum borð um borð og mest sum stavn um stavn, men á málinum var Hvassi reingina frammanfyri Drekan.

Á norðoyastevnu vann Drekin, meðan Hvassi var næstfyrstur. Eftir at Hvassi vann í heimasjógvi eru hesir báðir bátarnir javnir í stigum í FM kappingini.

Í fjør var Hvassi meistari. Tá vann Hvassi seks róðrar, meðan Drekin vann ein róður. Drekin vann á jóansøku. Leygardagin fæst at síggja, um tað verður Drekin ella Hvassi, sum fer at vinna á jóansøku.

Leygardagin bendi einki á, at nakar annar enn Drekin og Hvassi fara at verða sannlíkir vinnarar á jóansøku. Munurin frá Drekanum og aftur til næsta bátin, sum var Junkarin, var tvær bátslongdir, og so var aftur ein bátslong aftur til Firvald, aftur ein aftur til Jallin og síðani næstan tvær bátslongdir aftur til Blik og Tambar.


